# Vitus

BANKNORDIK



## Málreglur

### Ð

- **Kunnu vit siga hitt um eitt navnorð, hevur tað ð.**
  **dømi:** hon leiddi (hitt) lítla barnið – (hitt) barnið flenti hjartaliga.
- **Kann dømt ella dømd standa í staðin fyri eitt sagnorð, hevur tað ð.**
  **dømi:** hon hevur dømt/bakað kakuna – kakan er dømd/bakað.
- **Ferð og gerð hava ð, tá ið tey eru navnorð, og ikki ð, tá ið tey eru sagnorð.**
  **dømi:** hon fer eina langa ferð – hon ger eina góða gerð.
- **Boðsháttur í fleirtali endar við ð.**
  **dømi:** sitið still – haldið uppat.

### IR og UR

- **Navnorð við -a í eintali hava -ur ella -u í fleirtali.**
  **dømi:** kona, konur – eyga, eygu.
- **Móðir, bróðir, systir, mostir og fastir hava -ir í hvørfalli, annars hava tey -ur.**
  **dømi:** har er systir mín, eg elski systur mína – mostir mín er kul, eg vitji mostur mína
- **Sagnorð við einum stavilsi í tátíð hava -ur í nútíð.**
  **dømi:** át, etur – lá, liggur.
- **Sagnorð við -lja, -mja, -nja og -vja hava eisini -ur í nútíð.**
  **dømi:** selja, selur – fremja, fremur – venja, venur – krevja, krevur.

### Komma

- **Altíð komma framman fyri tá ið, men og meðan.**
- **Altíð komma framman fyri ið, tá tað merkir sum, og sum, tá tað merkir ið.**

**Minst til:** at lesa gevur tær góðar upplivingar og lærir teg samstundis at stava.

BN2316